*Møguliga 5 mill. kr. aftrat í Lopranshol*

# Nøkur feløg helst sinnað at halda fram við Lopransboring

JAN MÜLLER

Arbeitt verður framvegis við at fáa borin leysan í Lopransholinum. Nú í meira enn eina viku hava serkønir frá eini útlendskari fyritøku roynt at „fiska" boristrongin upp. Teir hava fingið nakað væl upp, men enn situr nakað eftir. Tað ber ikki til at fara undir aftur boringina, fyrr enn teir hava fingið allan boristrongin upp.

Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas sigur, at teir fara at royna at fiska í nakrar fáar dagar aftrat.

Teir hava síðani gjørt eina meting av møguleikunum og hvat tað møguliga fer at kosta at halda fram við royndunum at fáa boristrongin upp og síðani at fara undir aftur boringina.

Her verður m.a. kannað, hvussu nógv og hvørji av oljufeløgunum eru sinnað at koyra fleiri pengar í holið.

Enn eru pengar eftir til nakrar dagar, men verður avgjørt at halda fram, so er tørvur á umleið 5 mill. kr. aftrat.

Arne Rosenkrands Larsen sigur, at onkur av feløgunum eru sinnað til at seta fleiri pengar í, meðan onnur ikki eru tað.

Ein kann so eisini koma í ta støðu, at nøkur feløg siga, at tey eru sinnað til at fíggja arbeiðið víðari, men henda støðan er ikki greið enn.

Uppá fyrispurning um tað ikki kann virka eitt sindur løgið, at tað nú bráddliga bert skulu vera nøkur av teimum 19 feløgunum, sum skulu hava upplýsingarnar váttar Arne Rosenkands Larsen, at hetta kann gerast ein fløkt støða. Ti upprunaliga hava 19 feløg verið við til at gjalda fyri upplýsingarnar.

Gera bert nøkur feløg av at fara víðari, so verða ætlaðu mátingarnar gjørdar í holinum nú, soleiðis at øll 19 feløgini fáa tær.

Hóast nøkur feløg gera av at fara víðari, so er eingin trygd fyri, at tað fer at eydnast at koma í gongd aftur við boringini.

### Hava fingið nógvar upplýsingar longu

Hvussu kennist tað nú at skula gevast, áðrenn komið er á mál, og hava teir fingið tað burtur úr sum ætlanin var spurdu vit Arne Rosenkrands Larsen.

-Eg haldi avgjørt vit hava fingið nakað burtur úr.

*-Valt er at halda týdandi upplýsingar um úrslitið av boringini loyniligar. Hetta gjalda oljufeløgini m.a. fyri. Men ein má rokna við, at okkurt lekur út so ella so. Tá er so bara spurningurin, hvat er fakta og hvat gitingar. Onkur hevur sagt ella gitt, at tit møguliga eru komnir niður á oljuberandi løg ella enntá olju og gass. Er eitt vet av sannleika í tí ella er hetta galimatias?*

-Tað havi eg onga meting um. Sum eg longu havi sagt, so var møguleikin fyri at koma niður á olju og gass, tá vit fóru undir hesa boring, minimalur, og hann er heldur ikki vorðin størri av, at vit bora. Hann er og hevur alla tíðina verið minimalur.

### Reina líkju motvegis pressuni

*Men hvat sigur tú so til, at steðgurin í boringini nú, møguliga er eitt slag av „afledningsmanøvre" - at tit eru komnir niður á nakað, sum er so áhugavert og kollveltandi, at tit rætt og slætt ikki kunnu fara víðari nú men gevast meðan tíð er og viðgera hesa nýggju støðu, áðrenn tit møguliga fara víðari. Koma tit niður á olju, so stendur tað jú greitt, at hon tá er ogn hjá Føroyum!*

-Eg fari ikki at blanda meg uppí allar hesar gitingarnar. Kann bert siga, at okkara politikkur hevur verið at reka eina so reina linju móti pressuni sum møguligt.

*-Tú vil also hvørki vátta ella avsanna nakað?*

*-Nei.*

-Og tú vil heldur ikki vátta, at hesar gitingar eru burturvið - tað reina galimatias?

-Tað er væl langt at fara.

Arne Rosenkrands Larsen er annars varugur við, tað kann sjálvandi leka nakað út, tá ein slík boring fer fram í einum lítlum øki sum tí føroyska. Hann meinar tó framvegis, at tað eru nógvar gitingar í øllum hesum. Annað vil hann ikki siga.

Upprunaliga var ætlanin at koma niður á 3500 metrar við hesi boringini. Holið, sum varð borað í 1981 kom niður á góðar 2000 metar.

Tey 19 oljufeløgini, sum eru við, guldu við byrjan tilamans 28 mill. kr. Síðani hava tey játtað at gjalda 7 mill. kr. aftrat, og nú er so ein ætlan gjørd, sum gongur út uppá at gjalda einar 5 mill. kr. aftrat. Tvs. at verður hildið fram við Lopransboringini fer øll verkætlanin at standa í 40 mill. kr.










## Føroya Forngripafelag

Aðalfundur felagsins verður í Listaskálanum mánadagin 7. oktober 1996, kl. 20.00

Skrá sambært lógini.

Eftir aðalfundin greiðir Osva Olsen frá forvitnisligu kanningum sínum av Húsunum í Koytu Heima á Sandi

24 í hesum mánaði varð felagið áttati ár, og í hesum sambandi verður góður kaffi- ella temunnur boðin

**Nevndin**



tá ið grønt lýsir

*Móttøka*




*Í sambandi við at liðin eru 50 ár, síðani elfelagið SEV varð stovnað, verður almenn móttøka á skrivstovu elfelagsins á Landavegi 92, Tórshavn, týsdagin tann 1. oktober 1996 frá kl. 15.00 - 18.00.*

SEV